

Tónleikur

# Gamla Reinsarí møguligt spælistað í Havnini

**Mikudagin í síðstu viku vórðu politikarar, kommunufyrisiting, tónleikarar og tónleikaáhugað savnað niðri í Gamla Reinsaríi á Tórsgøtu til presentatión av hølinum sum møguligum spælistaði. Móttøkan frá fólki var framúr positiv, og mest sum øll vóru á einum máli um, at staðið í framtíðini kann gerast ein týdningarmikil liður í miðsavnanini av tónleikalívinum í Havnini.**
**Her eru seks ymsir vinklar um Gamla Reinsarí sum spælistað frá fólki, ið øll á einhvønn hátt eru knýtt at føroyska tónleikalívinum**

*Sunneva Háberg Eysturstein*
*myndir: Jan Müller og Eirikur Lindenskov*

Bogi Andreassen, fyrireikari av Asfalt, leiðari í Margarinfabrikkini og ein av stjórunum í Five Star Entertainment, var stigtakari til hesa presentatiónina og bíðar nú spentur eftir at fáa aftursvar frá kommununi.

- Tað hevur verið tosað nógv um at brúka Gamla Reinsarí sum spælistað í langa tíð nú, og endamálið við hesum fundinum var at vísa á, um tað yvirhøvur ber til at brúka staðið til nakað sum helst. Politikkarar, umsiting, tónleikarar og onnur áhugað vórðu bjóðað við.

- Tað er nevniliga so, at politikkararnir eru blivnir nakað forvirraðir av øllum prátinum um hetta. Summi siga, at tað hevði riggað, ímeðan onnur siga, at tað ikki hevði riggað. Eg skjeyt upp fyri kommununi at bara royna tað av. At bjóða fólki inn har at hoyra tónleik, so tey kundu sleppa at kjakast eitt sindur um tað, púra óformelt.

- Vit bjóðaðu m.a fjølmiðlum, SamVit, Tutl, Fut, MenTón osfr. Anna Katrina Petersen framførdi fólksligan popp við einum bólki, og tað riggaði ordiliga væl inn. Fólk vóru ótrúliga positiv, bæði tónleikarar og politikkarar, og niðurstøðan hjá teimum flestu var, at Gamla Reinsarí væl kann brúkast sum spælistað. Tað hevur eina góða støðd, staðið er hugnaligt, og so ljóðar tað eisini væl inni har. Tað eru sjálvsagt onkrar ábøtur, sum skulu gerast, fyri at fáa tað heilt optimalt, men sum er, er tað í øllum førum eitt gott stað at byrja. Nú bíða vit bara eftir, at kommunan tekur næsta stig at koyra tað víðari. Tað er spennandi at vita, hvat fer at henda, sigur Bogi.

**Tórshavnar Kommuna er positiv**

Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóri hjá Tórshavnar Kommunu sigur, at tað er stórur politiskur vilji og ynski um at gera eitt spælistað í Havnini.

- Hetta avprøva vit nú í Hansens Pakkhúsi, ella Gamla Reinsarii, sum tað verður kallað á vanligum máli. Tað hevur verið snakkað leingi um, hvat húsið skal brúkast til, og vit hava nú avgjørt at prøva tað av sum spælistað. Vit hava arbeitt við ymsum alternativum hølum, men í løtuni er tað so hetta, sum vit hyggja heilt konkret uppá.

- Tað er tó týdningarmikið at leggja sær í geyma, at eingin endalig avgerð er tikin enn við Gamla Reinsarii, men at vit enn bara eru í prosessini at finna útav, um tað kann brúkast. Tað var tí, vit høvdu tiltakið í síðstu viku; fyri at avprøva akustikk og stemning. Ætlanin frá nú og fram til Ólavsøku er at hava reglulig tiltøk av hesum slag við ymskum tónleiki, fyri at finna útav, hvussu tað riggar í ymsum samansetingum. Og tá so hetta tíðarskeiðið er farið, fara vit at gera eina evaluering, greiðir Ingibjørg frá.

**Appelera til ein breiðan málbólk**

Hergeir Staksberg, tónleikari, heldur, at Gamla Reinsarii hevði verið eitt gott alternativ til hini støðini, sum eru í býnum.

- Eg haldi, at staðið er kul. Har er ikki ov snobbut, men tað hevur eitt feitt, gamalt huglag og persónligheit. Gólvið skal líka viðgerðast eitt sindur, og tað skal eisini ljóðisolerast, men annars kann tað rigga ordiliga væl. Nú, tá Kaggin fór, er hetta næstan eisini tann einasti møguleikin. Tað er tó eingin, ið sigur, at hetta verður tað endaliga spælistaðið, men tað er í øllum førum eitt gott stað at byrja.

- Eg giti eisini, at tað hevði verið gott fyri at máta pulsin og útvikla seg. Líka sum t.d Losjan í Gøtu. Í løtuni er tað bara Margarinfabrikkin, men har koma ongantíð meira enn 50 fólk, og tey eru øll ræðuliga ung, sum ganga har. Gamla Reinsarí hevði kunnað appelerað meira til tey eldru og kanska havt ein breidri málbólk. Tað skal bara gerast kul og fáa skeinkiloyvi, so kann tað blíva ordiliga gott. Tað hevði eisini verið eitt gott alternativ til hini støðini, tí í løtuni er tað alt ov einstáttað, og tú mást næstan vera ein dansibólkur, fyri at kunna framføra nakrastaðni.

**Gott fyri samfelagið**

Beinta Gregersen, ið er leiðari og íverksetari av Húsinum og Dávavirkinum í Klaksvík, hevur hesar hugleiðingar um Gamla Reinsarí sum møguligt spælistað:

- Eitt spælistað hevur so ræðuliga stóran týdning fyri eitt samfelag. Um ikki nakar pallur er hjá tónleikarum at framføra á, koma teir ongantíð út við tí, sum teir gera.

- Tað hevur ikki bara týdning, at tað er ein pallur, men eisini at tað er ein pallur fyri teir lítlu, óroyndu bólkarnar. Í Havnini er jú egentliga bara Norðurlandahúsið, og har skalt tú vera rættiliga etableraður, fyri at kunna spæla. Tað manglar ein pallur til øll tey, sum spæla tónleik, ið ikki er mainstream og ikki endiliga savnar eitt so stórt publikum. Tey fáa umfram pallin eisini eitt umhvørvi at ferðast í, líkasinnað fólk at práta við og útveksla royndir við, viðmerkingar frá áhoyrarum osfr, sum kann vera ræðuliga læruríkt fyri tey. Eitt sovorðið spælistað er eisini viktugt fyri okkum sum áhoyrarar. Tí hvar skulu vit annars hoyra hendan tónleikin?

- Gamla Reinsarí er absolutt ein góður møguleiki at skapa eitt slíkt stað. Tað vera nokk nakrar forðingar hjá harða tónleikinum, tí tað er so nógv søga í bygninginum, at kommunan nokk ikki verður við uppá at gera tær stórvegis broytingarnar í húsinum. Men hetta er í



*- Eitt spælistað hevur so ræðuliga stóran týdning fyri eitt samfelag. Um ikki nakar pallur er hjá tónleikarum at framføra á, koma teir ongantíð út við tí, sum teir gera, sigur Beinta Gregersen, leiðari av Húsinum í Klaksvík*



*- Fólk vóru ótrúliga positiv, bæði tónleikarar og politikkarar, og niðurstøðan hjá teimum flestu var, at Gamla Reinsarí væl kann brúkast sum spælistað, sigur Bogi Andreassen, leiðari í Margarinfabrikkini*



*- Tað er stórur politiskur vilji og ynski um at gera eitt spælistað í Havnini, sigur Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóri í Tórshavnar Kommunu. Heðin Mortensen, borgarstjóri, var sjálvandi eisini við til móttøkuna*